## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# HATTA VAR LORKUT, LØKKE

Tað var sum at stíga langt aftur í tíðina, tá vit mikukvøldið hoyrdu Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharra, í útvarpinum boða frá, at um Føroya Løgting samtykkir stjórnarskipanaruppskotið, sum allir flokkar hava tikið undir við, so var loysingin byrjað.

Sikkin nakað slutur og vrøvl. Hvussu kann ein stjórnarleiðari í Danmark finna upp á at siga slíkt? Hann veit væl, at Føroya fólk ikki vil hava loysing. Hann veit væl, at tað bara er ein flokkur, sum hevur loysingina sum stevnumið - og tað er tá als ikki vist, at øll í Tjóðveldi taka undir við loysing. Tí er loysingin sum hugtak nakað sum er farið í bakgrundina - eisini hjá Tjóðveldi.

Men tað merkir ikki, at føroyingar ikki ynskja meira sjálvræði. Og hví skal tað vera í andsøgn til ein ríkisfelagsskap, at fólkið í Føroyum setir nakrar treytir fyri, hvussu viðurskiftini í hesum landinum skulu skipast? Hví skal tað vera ein trupulleiki, at fólkið í Føroyum sjálvt vil gera av, hvørja stjórnarskipan vit hava?

Danskir forsætisráðharrar hava tosað við einari tungu í nógv ár. Allir sum ein siga, at um føroyingar vilja hava loysing, so fáa teir loysing. Hetta hevur Lars Løkke Rasmussen eisini sagt. Tí var tað, sum hann segði mikudagin, ikki klókt. Tað er heldur ikki taktiskt ella politiskt korrekt. Okey, kanska tað er ein roynd at hjálpa Sambandsflokkinum - ella onkrum veingi í Sambandsflokkinum. Men tað er heldur ikki klókt.

Føroyingar hava í meira enn 100 ár togast um ríkisrættarligu støðuna. Hetta hevur havt við sær, at politiska skipanin ikki hevur fungerað - og framvegis ikki fungerar, tí flokkar og hugsjónir eru býtt sundur eftir hesum destruktiva leistinum - fyri ella ímóti Danmark. Vanligur blokkpolitikkur, sum vit kenna tað úr øðrum londum, er púra óhugsandi her hjá okkum. Í flestu londum er valið so einfalt. Reytt ella blátt, borgarligt ella sosialdemokratiskt.

Ein semja um stjórnarskipanina hevði verið kærkomin. Hon hevði gagnað allari tjóðini - ja øllum ríkinum. Spell at ein forsætisráðharri soleiðis skal leggja seg út í innanhýsis føroyskan politikk. Men løgtingið skal bara standa við sítt. Tað er politikkur. Tað ger einki, sum stjórnarskipanarlógin ikki samsvarar við grundlógina. Tað er als ikki neyðugt - tí tað ger heimastýrislógin heldur ikki. Soleiðis er politikkur, hann kann mýkja. Politikkur er jú at vilja broytingar.



**Tað var ikki klókt, sum Løkke segði mikudagin**

---

## Skúlbrak á torginum í SMS



Í dag og í morgin setta tey skúlabørn í fokus í SMS. Fyrilestrar um at lesa fyri børnum og undirhald við Meylu eru á skránni.

Í Rit og Rák fara Bjørghild Djurhuus og Gitte Klein hava fyrilestur frí ggjadagin klokkan 16.30. Gitte sigur frá um týdningin at lesa fyri børnum og Bjørghild sigur frá um broytingarnar hjá barninum, um at byrja í 1. flokki.

Fríggjadagin og leygardagin er stórt tiltak í Torginum í SMS fyri øll skúlabørn. Tey, ið júst eru byrjað í 1. flokki, fía ein gávuposa við ymiskum gávulutum, sum eru góðir at hava til skúlabyrjanina. Í posanum er mateskja, góð matpakkahugskot, tímatalva, roknitalva, vinabókin »Vinir mínir« og nógv annað.

## Baklandið átalar Sjálvstýri



Heðin D. Poulsen og Kári Petersen, sum báðir stillaðu upp fyri Sjálvstýrisflokkin seinast, átala nú tingmenn floksins fyri at ganga ímóti flokssamtyktum viðvíkjandi fiskidøgum.

- Vit mugu tíverri staðfesta, at umboðið hjá tí flokki, sum vit hava rikið atkvøður til, ikki hevur lagt fram nakað alternativ til daganiðurskurð til tess at náa hesum málum um lívfrøðiliga burðardygga og búskaparliga gevandi fiskivinnu.

Soleiðis siga teir báðir í lesarabrævi, teir hava sent bløðunum. Hóast teir báðir koma úr ávikavist Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum, so stillaðu báðir upp fyri Sjálvstýrisflokkin seinast og siga, at teir fóru til val fyri Sjálvstýrisflokkin til seinasta løgtingsval við lyftinum um burðardygga fiskivinnu, og hana vilja teir hava.

- Fyrsta fortreytin fyri at fiskivinnan skal kunna dríva samfelagshjólini er, at hon er burðardygg. Vit mugu ikki lata gýtingarstovnar minka niður um lívfrøðiligu tilráðingarnar – og vit mugu ikki taka fiskin ov tíðliga. Hetta er burðardygg fiskivinna lívfrøðiliga sæð. Búskaparliga skal veiðan helst minkast enn meira, tí fyri at vinnan aftur skal fáast at geva yvirskot, so er neyðugt, at munandi færri skip eru í vinnuni enn í dag, siga teir báðir ónøgdu sjálvstýrismenninir.



**Tá ruðuleiki verður normurin**

HEINI Í SKORINI
KJAK Á SÍÐU 14



**Óklókur leikur frá Løkke**

SJÚRÐUR SKAALE
KJAK Á SÍÐU 10

## Kirkjan í rørslu í Hoyvík

Mikukvøldið 25. august klokkan 19 er Miðvika í Hoyvíkar kirkju við Sonju Klein. »Kirkja í rørslu« er heitið.

Á Miðvikunum er vanligt at fólk við ymiskari vitan hugleiða um evni, ið eru uppi í tíðini. Eisini er ætlanin at fáa fólk, ið hava vart doktara/PhD- ritgerðir í ávísum evni og serkøn á ymsum økjum at røða um hesi ting.



Hesaferð verður tað so Sonja Klein, sum tosar um »Kirkja í rørslu«. Hvussu flytir kirkja okkara seg? Hvussu riggar hon í nútíðarliga umhvørvinum? Alternativar gudstænastur. Kirkjan og familjan. Sonja hevur verið í lestrarfarloyvi og hevur fingið íblástur til fyrilesturin haðani.

- Øll eru vælkomin, siga fyrireikararnir.

## Sjómannadiskotek í Klaksvík

Í morgin, leygardagin, verður stórt diskotek á Sjómannadegnum í Klaksvík.

Tiltakið verður í einum tjaldi, ið verður sett upp undir skýlinum við fótbóltsvøllin. Í tjaldinum verður tað DJ Haywire, sum fer at rocka dansigólvið upp á kók, sigur Rói Clementsen, fyrireikari

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*